# Væntar at onnur lond fara at boykotta føroyskan laks

**Landsdjóralæknin sigur, at ILA -gølan á Bakkafrost og Alistøðini á Bakka kann eisini fáa avleiðingar fyri royndirnar hjá føroyingum at sleppa at koppseta fyri ILA**

MATVØRUGØLA
*Áki Bertholdsen*



*– Støðan hjá føroysku alivinnuni eftir illgrunan um, at fiskur, sum er deyður av ILA, er útfluttur til matna, kann samanberast við forboðið fyri nøkrum árum síðani ímóti at flyta neytakjøt úr Bretlandi eftir at neytaøði og munn- og kleyvasótt herjaði har, heldur Bjørn Harlou, Landsdjóralækni*

Er illgrunin rættur um at Bakkafrost og Alistøðin á Bakka hava útflutt laks til matna, sum er sjúkur ella deyður av ILA, væntar Landsdjóralæknin, at tað fer at fáa álvarsligar avleiðingar fyri føroysku alivinnuna.

Tað hevur hann boðað Havbúnaðarfelagnum frá í eini kunning um málið.

Bjørn Harlou sigur, at Heilsufrøðiliga Starvsstovan fór at kanna viðurskiftini á Bakkafrost og á Alistøðini á Bakka, eftir at tíðindi vóru farin at ganga um, at virkini tóku fisk, sum var deyður av ILA og útflutti hann til matna.

Eftir kanningarnar heldur Heilsufrøðiliga Starvsstovan, at hon fekk váttað at so var.

– Heilsufrøðiliga Starvsstovan hevur staðfest, at fiskur, sum nýliga var deyður av sær sjálvum, varð skildur í kassar og ísaður og fluttur inn á laksavirkið, har hann var virkaður.

Fiskur, sum var deyður av sær sjálvum, men sum ikki var feskur, var fluttur til lands óísaður, har hann varð malin til ensilasju á laksavirkinum.

Landsdjóralæknin sigur við havbúnaðarfelagið at tað er bæði brot á kunngerðina um niðurberjing av ILA og brot á matvørulógina at taka laks til matna, sum er deyður av ILA.

Hann segði eisini við Havbúnaðarfelagið mánadagin, at eftir øllum at døma var so nógvur fiskur tikin, sum var deyður av ILA, at tað var bara ein spurningur um tíð, áðrenn fjølmiðlarnir fingu tað at vita.

– Og tá ið føroyskir fjølmiðlar hava fingið tað at vita, verður tað skjótt, at eisini útlendskir fjølmiðlar fara at taka málið upp.

### Halda uppat at keypa føroyskan laks

Landsdjóralæknin sigur, at málið er so álvarsligt, at hann hevur skyldu at boða ES myndugleikum frá hesum, saman við eini fráboðan um, hvørji stig, føroyskir myndugleikar taka ímóti alivirkin um og hvørji stig verða tikin fyri at forða fyri, at hetta endurtekur seg.

Og hann stúrir fyri, at avleiðingarnar fyri føroysku alivinnuna verða sera álvarsligar.

– Tað er væntandi, at útlendindskir innflytarar og brúkarar fara at boykotta føroyskan alifisk.

Samstundis ber ikki til at siga, um eitt slíkt boykott eisini fer at breiða seg til eisini at umfata innflutningin av øðrum fiskavørum úr Føroyum.

– Undir øllum umstøðum fer tað at taka drúgva tíð at byggja uppaftur álitið hjá brúkarum og innflytarum uttanlands á føroyskan laks og úrdráttir úr laksi.

– Tað er eisini væntandi, at ES myndugleikar fara at ivast stórliga í, hvussu føroyingar handfara ILA trupulleikan.

– Tað er ikki ósannlíkt, at ES myndugleikar heilt ella partvíst fara at banna innflutningi av føroyskum laksi og úrdráttir úr laksi.

– Somuleiðis hava tey einstøku londini hvør sær heimild til at steðga innflutningi av føroyskum laksi og laksaúrdráttum

Bjørn Harlou sigur, at støðan hjá føroysku alivinnuni í løtuni, kann samanberast við forboðið, sum fyri nøkrum árum síðani var sett ímóti at flyta oksakjøt úr Bretlandi í sambandi við munn- og kleyvasóttina og neytaøði.

### Avleiðingar fyri koppseting

Landsdjóralæknin sigur eisini, at tað er óvist um hendan gølan eisini fer at fáa avleiðingar fyri royndirnar at fáa ES myndugleikar at góðkenna at føroyingar fara at koppseta fyri ILA.

– Men bæði ES kommisiónin og og heilsufrøðiligu starvsstovurnar í teimum ymsu londunum, hava gjørt púra greitt, at tað kann ikki koma upp á tal at loyva føroyingum at koppseta fyri ILA, verða munadygg tiltøk ikki samstundis sett í verk fyri at kunna taka ILA raktan laks beinanvegin sjúkan vísir seg og fyri fyri at forða fyri, at smittan inn breiðir seg, sigur Landsdjóralæknin.

# Kann oyðileggja nógv fyri føroyska alivinnu

**Hevur Bakkafrost og alistøðin á Bakka svikað við ILA, hava teir hugsað ov nógv um seg sjálvar og ov lítð um samfelagið sum heild, heldur Rói Egholm á Farex, sum eisini selur nógvan laks**

ÚTFLUTNINGUR UNDIR ILLGRUNA
*Áki Bertholdsen*

– Er tað rætt, at Bakkafrost og Alistøðin á Bakka, hava svikað við ILA sjúkum laksi, kann tað verða eitt ógvuliga stórt bakkast fyri føroysku alivinnuna.

Tað heldur Rói Egholm á fiskasøluni, Farex, sum eisini selur nógvan laks.

Men hann væntar ikki, at hetta fer at fáa avleiðingarnar fyri sjálvan marknaðin, altso tey, sum keypa føroyska laksin, ella fyri prísin sum so.

Tó ásannar hann, at hetta kann føra við sær, at felagsskapir í ES fara at royna at ES myndugleikar at bannað innflutningi av føroyskum laksi fyri at sleppa undan einum kappingareneyta og hvat tað kann enda við, er óvist.

### Hava svikið álitið

Rói Egholm stúrir meiri fyri øðrum avleiðingum, sum hetta kann hava við sær.

– Hesi seinastu árini hevur ES víst føroysku alivinnuni stórt álit.Men hava vit kvittað fyri hetta álitið við at svikað við ILA, er tað eitt álvarligt álitisbrot, sum tað kann taka langa tíð at byggja upp aftur. Og tað er nógv álvarsligari enn tær avleiðingarnar, hetta kann fáa fyri sjálvan marknaðin, sigur Farex- maðurin við Sosialin.

Hann sigur, at hesi seinastu árini hevur ES góðtikið, at nógv av eftirlitinum og pappírsarbeiðnum, ið er tengt at eisni sølu, er lagt út á vinnuna sjálva og á útflutningsfyritøkuna og føroyskar myndugleikar annars.

Samstundis hava tey ymsu liðini í Føroyum, vinnan, útflutningsfyritøkurnar og myndugleikarnir havt álit á hvørjum øðrum, at øll liðini arbeiddu eftir forskriftunum.

– Tað hevur havt ómetaliga nógv at siga, at vit hava kunnað havt eftirlitið her heima hjá okkum sjálvum og at vit hava havt hetta álitið á hvørjum øðrum, tí tað hevur gjørt alla skipanina nógv smidligari og hevur verið eitt veruligt framstig fyri útflutningin.

– Hevur eitt lið í føroyum brotið hetta álitið, sum vit hava havt fleiri ár um at bygt upp, er tað sostatt ómetaliga óheppið

Rói Egholm sigur, at avleiðingin av hesum kann vera, at vit noyðast aftur til tað gamla, at fólk skal vera á bryggjuni at kanna eftir um útflutningspappírini og vøran samsvara, og at bilarnir við fiskavørum haraftturat eisini skulu latast upp og eftirkannast, tá ið teir koma í land í eini ES havn, fyri at vita um alt samsvarar.

– Vit eru so langt burtur, at tað hevur verið ein ómetaligur fyrimunur fyri okkum, at skipanir og mannagongdir heilt frá framleiðsluvirkinum, til endaligu viðskiftafólkini, eru so smidligar, sum gjørligt.

– Skulu vit aftur til tað gamla, kann tað føra við sær, at útflutningurin verður óneyðuga seinkaður, tá ES skal eftirkanna tær vørur, sum koma úr Føroyum.

### Átaluvert

Hinvegin sigur Rói Egholm eisini, at tað kann eisini vera rætt, tá ið Jan Mortensen í Vinnuhúsinum heldur, at hetta kann júst brúkast sum eitt prógvmótvegis ES, at okkara eftirlit virka.

– Men er illgrunin ímóti Bakkafrost og Alistøðini á Bakka rættur, tað kann so ikki forsvarast við, at hetta vísir, hvussu væl okkara eftirlit virkar.

– Øll virki mugu laga seg til, at tey arbeiða undir eini felags skipan og verður hendan skipanin brotin, er tað átaluvert, tí so hevur viðkoamndi virki hugsað ov nógv um seg sjálvt og ov lítið um samfelagið við at seta forskriftir til viks og við at máa støðið undan tí áliti, sum er bygt upp ímillum allar partar.

– Hóast hetta ikki er eitt stórt mál i sær sjálvum, er tað grundleggjandi skeivt at bróta tær reglur, sum eru. Og orsøkin til, at føroyskir myndugleikar fara so harðliga til verka, er tí, at vit hava so stórt álit frá ES til sjálvi at syrgja fyri, at lógir og forskriftir verða hildin.

– Tað er ræðandi at minnast aftur á, hvussu tað var fyrr og, hvussu trupult tað var at útvega váttanir og alt annað pappír, sum skuldi til, fyri at avgreiða eina sølu og vit mugu undir ongum umstøðum aftur til tað skipanina, sigur Rói Egholm.



*– Tað er ræðandi at minnast aftur á, hvussu støðan var fyrr og vit mugu undir ongum umstøðum aftur til tað skipanina, sigur Rói Egholm*



# Ársins arbeiðspláss er í Miðvági

**Føroya Fiskavirking í Miðvági vann í dag heitið Ársins arbeiðspláss. Tað er væl uppiborið halda starvsfólkini**

ARBEIÐSUMHVØRVI
*Marjun Dalsgaard*




*Albert Ellefsen er ein fegin virkisleiðari. Hann heldur, at heiti Ársins arbeispláss er ein sera stórur heiður, og kappingin eggjar til at gera meira við arbeiðsumhvørvið. Umframt Albert Ellefsen fekk Ragnhild Olsen, álitiskvinna eisini blómur*

Virkisleiðari á Føroya Fiskavirking í Miðvági, Albert Ellefsen, er ein sera stolut maður í dag.

- Eg haldi, at hetta er ein stórur heiður, at vit eru vald sum Ársins arbeiðspláss, og tað er eingin ivi um, at tað fer at hava positiva árvirkan á leiðsluna og starvsfólkið eisini. Hann vónar, at hettar verður eitt afturvendandi tiltak.

- Tað er av stórum týdningi, at hetta heldur fram, tí tað er so motiverandi fyri at arbeiða við arbeiðsumhvørvi. Vit eru sera fegin um heiti, men nógv manglar í. Til dømis er nógvur larmur á virkinum, sigur Albert Ellefsen og leggur aftrat:

- Og so bjargaði tað mínum degi – HB hevði annars oyðilagt hann. Hann er venjari hjá FS Vágar, ið tapti 3-2 móti HB mikukvøldið.

### Toppkarakter fyri trivna og trygd

Í metingini av virkjum var serligur dentur lagdur á fýra umstøður. Fyrst og fremst, um starvsfólkð hevði svara ymiskt ella einsháttað upp á spurnarblaðið. Um tey svaraðu ymiskt, var tað tulkað, sum at tey vóru erlig – ikki høvdu nakað at dylja og kendu seg trygg. Umframt varð hugt eftir, hvussu leingi fólk eru á virkinum – tí er mett at vera tekin um, at góður trivnaður er á arbeiðsplássinum. Hartil um trygdin er í lagi, um leiðslan lurtar eftir starvsfólkunum, og um starvsfólkini eru stolt av at vera á júst hesum arbeiðsplássi.

- Firksavirking í Miðvági fekk toppkarakter í fýra teimum týdningarmestu spurningunum, sigur Svein Rógvi Nielsen. Tað var tó ikki fyrr enn hann hevði vitjað virkið, at hann var sannførdur. Undir vitjanini kannaði dómsnevndin, um umstøðurnar á virkjunum samsvaraðu við tað, sum tey hvødu fingið at vita.

- Hetta er eitt nossligt virki, trygdin er góð, góðar umstøður eru at eta og skifta í, og fólk eru glað fyri at verða her, sigur Svein Rógvi Nielsen.

# Vit flenna nógv

**Starvfólkini á Fiskavirking í Miðvági eru stolt og í góðum lag í dag, men tað eru tey ofta og halda hetta verða av stórum týdningi fyri, at Fiskavirking í Miðvági er eitt gott arbeiðspláss.**

ARBEIÐSUMHVØRVI
*Marjun Dalsgaard*

Í matstovuni á Føroya Fiskavirking í Miðvági hongur ein plakat, sum Albert Ellefsen hevur funnið í Ramnmubúðini í Havn. Her eru ymisk orðatøk um, at tað er gott at vera glaður.

- Eg keypti hana, tí eg vónaði, at onkur kanska steðgar upp og lesur hana av og á. Mær dámar best hattar við størstu bókstavum: De fleste smil starter med et smil. Og síðan hattar sum sigur, at um tað er møguligt at gera nakað betur, er tað ikki gott nokk, sigur hann.

Við eitt borð sita nakrar ungar gentur, sum arbeiða á Fiskavirking. Ein teirra er Berit Jacobsen.

*Ávirkar handan plakatin teg?*

- Eg veit ikki, um eg verði í góðum lag av henni, men eg plagi at hyggja eftir henni, tá eg flenni – serliga hasum: Latter er indre jogging, sigur Berit og flennur enn meir, enn áðrenn, síðan leggur hon aftrat – og vit flenna nógv her. Allar við borðið játta – tær halda, at tað er sera spennandi, at virkið er kosið til Ársins arbeiðspláss, men hava faktisk ikki fingið tað at vita frá leiðsluni enn.

- Tað hevur týdning, heilt sikkurt, og sjálvsagt verður ein stoltur, og kanska glaðari fyri at verða her. Eg vænti, at tað helst eisini fer at ávirka viðurskiftið millum leiðslu og starvsfólk og gera tað enn betur, sigur Berit. Hon hevur arbeitt á Fiskavirking í Miðvági í fimm ár og er glað fyri at verða har.

- Hetta er eisini gott, tí fólk hava kanska lyndi til at hyggja niður á fólk, sum arbeiða á einum flakavirki, men tað er ikki so galið, sigur hon. Tær leggja dent á, at tað altíð er góður hýrur á virkinum, og at fólk í øllum aldrum koma væl útav tí.



*Jona Samuelsen og Ólavur Hansen hava bæði starvast á virkinum í meir enn 30 ár, og nógv er broytt, meðan tey hava verið har*



*Vit flenna nógv, siga tær á Fiskavirking. Tær halda at Fiskavirking er eitt gott arbeiðspláss, og at tað fær týdning fyri arbeiðsumhvørvið framyvir, at tey nú hava vunnið heitið ársins arbeiðspláss*

### Hava verið her í 30 ár

Jona Samuelsen og Ólavur Hansen hava bæði starvast á virkinum í meir enn 30 ár og nógv er broytt, meðan tey hava verið har.

- Meiri er at gera nú, heldur Jona Samuelsen, sum er farin niður í hálva tíð síðan januar.

- Eg havi verið her í yvir 30 ár og havi altíð hingið í, nú havi eg valt at fara niður í tíð, sigur hon. Henni dámar væl á virkinum og leggur dent á, at lagið er gott á fólki.

Ólavur Hansen heldur avgjørt, at virkið hevur uppiborið at vunnið.

- Leiðslan her er góð. Vit hava góðar umstøður, og um tú hevur brúk fyri einum frídegi, stendur aldrin á, sigur hann. Nógv er broytt síðan hann byrjaði á virkinum, serliga arbeiðsumstøðurnar, og reinførið. Eisini er arbeiðið meiri stabilt. Hann er serliga glaður fyri, at fólk eru fyrikomandi og ein lærir nógv ymisk fólk at kenna.

- Tey ungu eru so øgiliga fitt og røsk, tað er virkuliga stuttligt, at læra tey at kenna, sigur hann.

## Ársins arbeiðspláss

Tað eru fakfeløgini, sum standa aftan fyri kappingina um Ársins arbeiðspláss, men undangongumaðurin er tann 29 ára gamli Svein Rógvi Nielsen, ið hevur valt at gera eina kanning av føroyuskum arbeiðsplássum sum endaliga uppgávu á Tekniska skúlanum í Havn, har hann lesur framleiðslutøkni. Virkini vóru fyrst vald út av eini dómsnevnd, har trý komu í finaluni, síðan varð avgjørt, hvør vinnarin var eftir at starvsfólkini á hesum trimum virkjum, høvdu svarað upp á eitt spurnarblað við 16 spurningum.

**Um kappingina**

Fyri at vera við í kappingini um ársins arbeiðspláss í ár, skuldi fyritøkan hava minst 25 starvsfólk og arbeiðið merkt av at vera fysiskt aktivt. 20 fyritøkur meldaðu seg til kappingina. Tríggjar vórðu valdar út og starvsfólkini á hesum fyritøkum fingu eitt spurnarblað við 16 spurningum. Út frá hesum spurnarbløðum verður Ársins arbeiðspláss funnið.

**Dómsnevndin:**

Í dómsnevndini, sum skal finna ársins arbeiðspláss, eru Sakaris Hansen fyri Havnar arbeiðsmannafelag, Hanna Isaksen fyri Klaksvíkar arbeiðskvinnufelag, Ingeborg Vinther fyri Føroya arbeiðarafelag, Kristoffur Olsen fyri Klaksvíkar arbeiðsmannafelag, eitt umboð fyri Rasmussen & Weihe, og Svein Rógvi Nielsen, næmingur á Tekniska Skúla í Havn